## DAGSINS MEINING

# Mannminkandi framferð

Seinasta dømið um vánaligu handfaringina av útlendinamálinum sást í Degi og Viku í gjárkvøldi.

Hóast politisku boðini klokkuklárt hava verið, at ein endurskoðan og uppstramman av útlendingapolitikkinum ikki skulu ávirka teir útlendingar, sum longu vóru integreraðir í føroyska samfelagnum, so var tað júst tað, sum hendi. Ein familja, sum øll bara hava gott at bera, og har maðurin við framúr ítróttarligu avrikum sínum gjøgnum fýra ár hevur lyft SÍ á føroyska flogbóltsheimskortið, fekk uttan aðra ávaring at vita, at nú varð uppihaldsloyvið hjá konuni ikki longt.

Tað ber í verandi støðu ikki til at staðfesta, hvørji viðurskifti hava gjørt seg galdandi í málsviðgerðini. Men tað má staðfestast, at framferðarhátturin í máliunum hevur verið uttan fyri mark. Tað brýtur við alla føroysku siðvenju og fólkaligheit, at menniskju á hendan hátt kalt og kynskt verða send av landinum. At grundgevingin bara er tann einfalda »Vit hava ikki tørv á tær longur« má somuleiðis sigast at vera ein mannminkandi framferðarháttur, har eingi sum helst atlit verða tikin til tær mannalagnur, sum avgerðin ávirkar.

At tað so samstundis ljóðar, at kanska 40 mál komandi tíðina verða avgreidd eftir sama leisti, kann ikki góðtakast. Tað má vera eitt krav, at okkara fólkavaldu politikkarar gera uppreistur móti hesi mannminkandi framferð. Hvørki einstaki føroyingurin ella Føroyar sum samfelag kunnu standa modell til hetta.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Har fór skattalættin – 2. partur

**Tað er ikki lukkuligt borgarstjórin og veruligi borgarstjórin leika í, tí minnilutin mælir til at varðveita verandi skattaprosent**

**Jan Christiansen**
*býráðslimur*



Bæði Heðin Mortensen og Jógvan Arge vóru skjótir við penninum, nú minnilutin í Tórshavnar Býráð vildu varðveita verandi skattaprosent og lata borgarunum ein skattalætta komandi ár.

Veruligi borgarstjórin í Tórshavn, Jógvan Arge, kallar minnilutan fyri heintar sprellimenn, ímeðan hin borgarstjórin, Heðin Mortensen, sigur, at bæði Beate L. Samuelsen og undirritaði ikki hava skilt nakað sum helst.

Jógvan er skilagóður, útspekuleraður og dugur væl at skriva, so kanska vit í minnilutanum skuldu tikið tað at okkum, tá hann kallar okkum heintar sprellimenn, men lat fara. Heðin er Heðin, so er tað sagt!

**Tey lágløntu merkja sviðan**

Men aftur til mista skattalættan. Landsskatturin lækkar komandi ár, og eru tað serliga låg- og miðalinntøkurnar, ið skulu merkja skattalættan. Landsskatturin er progressivur og tað ger, at láginntøkur gjalda minni part av lønini í skatti enn tær høgu inntøkurnar. Kommunuskatturin er hinvegin ein javnur skattur. T.v. s. at sami prosentpartur verður tikin av lønini til skatt av eini lágari løn sum av eini høgari løn. So við at flyta eitt prosent av landsskatti til kommunuskatt, vilt tú raka tey lágløntu serliga meint.

Nú meirilutin í Tórshavnar Býráð hevur hækkað skattaprosentið vilja hesi lágløntu serliga merkja sviðan av hækkingini. Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin vóru ímóti at hækka kommunuskattin, men Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin, ið hava meirilutan í býráðnum, vildu hinvegin hava kommunuskattin hækkaðan við einum prosenti.

So Heðin Mortensen, sum í løtini er altvitandi javnaðarmaður, hevur við skattahækkingini lagt eyka byrðar á tey lágløntu. Kanska var hækkanin av kommunuskattinum partur av skránni á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum inni á Svangaskarði herfyri.

Ein sannroynd er, at Tórshavnar Kommuna er sera væl fyri fíggjarliga, og við skynsamari fíggjarstýring kundu vit lættliga varðveitt verandi skattaprosent komandi ár.

# Sjálvstýrisflokkurin átalar viðferðina mótvegis útlendingum

YVIRLÝSING

Sjálvstýrisflokkurin átalar ta viðfer, útlendingar búsitandi í føroyum fáa.

Innlendismálaráðið hevur sett eitt útgreiningararbeiði í verk fyri at gera greiðar reglur í samband við viðgerð av arbeiðs- og uppihaldsloyvum.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin, ið hevði málsøki um hendi, gav lyfti um, at meðan útgreiningar- arbeiði fór fram, skuldi eingin umsókn um longt arbeiðs- og uppihaldsloyvi sum uppfylti treytirnar, sýtast.

Danir hava skrivliga boðað frá, at allar umsóknir verða viðgjørdar og avgreiddar samsvarandi tilmælinum frá Innlendismálaráðnum.

Nøkur teirra sum søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi, hava búð her í áravís, eiga hús og heim, tosað málið, eru avhildin av bygdafólkinum og blivin ein virkin partur av føroyska samfelagnum.

Fleiri av hesum ganga vegna væntandi svar úr Innlendismálaráðnum í støðugum ótta fyri at løgreglan bankar á dyrnar og boðar frá, at nú skulu tey avstað.

Verandi mannagongd hoyrir ikki heima í einum framkomnum samfelag, og er als ikki í samsvar við føroyska siðvenju og mentan.

**Landsnevnd Sjálvstýrisflokksins**
Sámal Petur í Grund, form.

**Starvsnevnd Sjálvstýrisfloksins**
Jan Asbjørnson Joensen

Kári P. Højgaard, floksformaður

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.